# Poppdreingir –




**– Vit royna hvørki at vera alternativir ella nýskapandi. Vit gera poppsangir, sum skulu vera sitandi í høvdinum á fólki, sigur Johan Mauritzson. Sangari í svenska bólkinum Charizma, ið er eitt av útlendsku nøvnunum á Fjarðafestivalinum í ár**

SAMRØÐA
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Tá ið teir tríggir Nikolausson-brøðurnir, Bo, Jan og Göran, av fyrstan tíð settu Charizma á stovn í 1984, spældu teir ikki popp, sum teir gera í dag. Við longum permanentaðum hári rokkaðu teir húsini sundur og saman hjá foreldrunum. Júst sum rættir 80'ara rokkarar eiga at gera.

Nógv er hent síðani tá. Mitt í hálvfemsunum ynsktu brøðurnir at ganga nýggjar tónleikaleiðir. Tíðin var farin frá 80'ara rokkinum, og tí var neyðugt at endurnýggja seg og fáa nýtt blóð inn.

Leita varð - og funnið. Thomas Karlsson og Johan Mauritzson, ávikavist gittaristur og sangari, løgdust aftrat, og saman settu teir fimm eina nýggja kós. Eina poppkós.

### Tann kristni básurin

Samstundis sum tónleikastílurin broyttist, varð eisini hugt eftir mátanum, ið tann kristni boðskapurin varð borin fram:

– Fyrr var alt nógv meiri fýrkantað og áleypandi. Tónleikurin hevði sum so einki at siga. Tað var bara ein miðil, ið varð nýttur til at fáa ein boðskap fram, sigur sangarin Johan Mauritzson.

– Men soleiðis er tað ikki longur. Ella tað halda vit í øllum førum ikki. Tekstirnir eru sjálvandi umráðandi, men eins nógv og tekstirnir kunnu røkka út, so kann tónleikurin eisini geva fólki nakað og røra nakað inni í teimum.

Samrøðan flytur seg yvir á kristnan tónleik:

– Um tú hugsar um tað, so er tað bara kristindómur av heimsins átrúnaðum, sum hevur ein heilan tónleikastíl fyri seg, christian music. Og tekur tú til dømis USA, so selur kristin tónleikur næstan eins nógv og country. Og country selur nógv har yviri!

- Men eg haldi ikki, at skilnaður og frástøða er tað rætta. Í Svøríki var tað soleiðis fyrr, at allur kristin tónleikur var koyrdur í ein bás, og vart tú kristin og ynskti at spæla tónleik, so var tað bara inni í hesum básinum, at tú vart góðtikin.

- Tíbetur er hetta broytt og liggur í fortíðini. Bólkar sum Switchfoot og The Fray, har øll manningin er persónliga kristin, marknaðarføra seg ikki sum kristnir bólkar og hoyra til ikki-kristin plátufeløg. Av tí sama røkka teir nógv longri út og avmarka seg ikki bert til kristna lurtaran.

Um sín egna bólk sigur Johan:

- Vit í Charizma eru allir kristnir, og trúgvin er ein natúrligur partur av okkara lívi. Hetta kemur sjálvandi til sjóndar í okkara tekstum og tónleiki, men vit hava ikki hug til at avmarka okkum bara til kristin. Vit vilja røkka longri.

### Pólskar stjørnur

Seinastu árini hevur Charizma gjørt vart við seg á svenska hittlistanum. Lagið 'Waiting (Here for you), av seinastu fløgu teirra 'Life in 3D', var sjey vikur á svenska hittlistanum og náddi heilt upp á eitt triðja pláss.

Men mest spennandi projektið hjá bólkinum seinastu tíðina, var luttøkan í pólsku Eurovision sangkappingini í februar í ár:

– Saman við týska teknobólkinum Scooter høvdu vit eina konsert í Pólandi fyri góðum ári síðani. Framførslan gekk so mikið væl, at fólkið har niðri eggjaði okkum til at luttaka í pólsku Eurovision sangkappingini.

– Vit fóru heim aftur til Svøríkis og í desember mánaði í fjør fingu vit at vita, at okkara lag 'Emily' var millum tey tíggju, ið skuldu